

## Nýggjar myndir frá 11.09.

Í USA hava myndugleikarnir almannakunngjørt fleiri túsund myndir av yvbirgangsatsóknini á New York tann 11. september í 2001. Talan er um myndir, sum tyrlur hjá løgregluni tóku, meðan tær sveimaðu uppi yvir World Trade Center fyri at vita, um fólk kundu hava bjargað sær upp á takið. Myndirnar hava verið loyniligar, men herfyri bað sjónvarpið ABC um innlit og fekk myndirnar útflýggjaðar. Samstundis hava amerikanskir søgufrøðingar fingið myndirnar. Álopið 11. september í 2001 kostaði 2.752 mannalív, skrivar AP.

# Havtaska og toskur lyfta undir prísirnar



*Tað eru línuskipini og útróðrarflotin, sum veiða mestu hýsuna*

*Mynd: FMF*

**Vanligur miðalprísur á Fiskamarknaði Føroya liggur millum 13 og 14 krónur fyri kilo. Hetta veldst tó um, hvussu stórar nøgdir av hvørj um fiskaslagi sær eru á marknaðinum, tá selt verður. Seinastu dagarnar hevur verið afturvendandi, at havtaska og toskur lyfta væl undir miðalprísirnar**

MARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskamarknaður Føroya seldi í gjár tilsamans 168,7 tons av fiski fyri stívliga 2,3 miljónir krónur.

Nógv tær størstu nøgdirnar á marknaðinum í gjár vóru toskur, hýsa og havtaska.

Av hesum stívliga 168 tonsunum, vóru eini 75 tons toskur, 35 tons hýsa og sløk 30 tons havtaska.

Rættiliga javnan, tá Fiskamarknaður Føroya selir hampiligar nøgdir av fiski, og fiskasløgini eru rímiliga blandað, síggja vit, at miðalprísurin fyri øll fiskasløgini samanlagt liggur millum góðar 13 og 14 krónur fyri kilo.

Soleiðis var eisini við søluna í gjár, tá miðalprísurin fyri øll fiskasløgini samanlagt var 13,80 krónur fyri kilo.

### Toskur og havtaska

Tað er serliga toskurin, sum lyftir undir miðalprísin á marknaðinum ein vanligan søludag. Hetta er bæði tí, at nøgdirnar av toski javnan eru tær størstu – og tí, at toskaprísurin vanliga liggur omanfyri miðalprísin, sum annars er á marknaðinum.

Onkrar dagar hava nøgdirnar av havtasku verið lutfalsliga størri enn nøgdirnar av eitt nú toski og hýsu, og tá síggja vit aftur ein hægri miðalprís, sum kann liggja um einar 17-18 krónur fyri kilo.

Størstu einstøku nøgdirnar á marknaðinum í gjár var toskur 3. Her fóru góð 32 tons fyri miðalprísin 14,46 krónur fyri kilo. Næst størstu nøgdirnar vóru av toski 4, og her fóru góð 28 tons fyri miðalprísin 9,83, sum ikki kann sigast at vera serliga góður toskaprísur.

Taka vit dýrasta fiskaslagið á marknaðinum í gjár, undantikið kalva, fingu 16 tons av havtasku 3 miðalprísin 23,31 krónur fyri kilo.

### Lágur hýsuprísur

Sølan á Fiskamarknaði Føroya í gjár vísir enn einaferð, at prísirnir á hýsu hava ilt við at hála seg uppeftir.

Nógv hevur verið frammi um stongsul í Bretlandi fyri virkaðari hýsu úr Føroyum, og tí fer hýsa, sum verður útflutt til Bretlands, heil og óvirkað av landinum.

Við søluna á Fiskamarknaði Føroya í gjár fóru 22,4 tons av hýsu 2 fyri miðalprísin 9,04 krónur.

Næst størstu nøgdirnar vóru í støddini hýsa 3, og her fóru 10,5 tons fyri miðalprísin 10,18 krónur fyri kilo.

Besti miðalprísurin á hýsu í gjár var 11,84 krónur fyri kilo, og hetta var fyri tann størsta fiskin, tó bert 2,5 tons.

Hóast vit halda, at prísirnir á hýsu sum heild eru lágir í Føroyum, segði formaðurin í Ráfiskakeyparafelagnum, Símun P. Jacobsen, herfyri, at prísirnir á føroyskari hýsu ikki eru lægri enn tann prísur, sum eitt nú íslendingar og norðmenn fáa fyri sama fiskaslag.

# Eingin rokveiða hjá partrolarunum

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár landaðu partrolararnir Eysturbúgvin og Vesturbúgvin. Teir høvdu umleið 180.000 pund av upsa tilsamans. Eysturbúgvin landaði á Sandi og Vesturbúgvin í Vestmanna. Sum skilst, hava skipini roynt eystanfyri og sunnanfyri hendan túrin.

### Eingin rokveiða

Veiðan hjá partrolarunum er ikki hin sama, sum hon hevur verið, tá hon var best í fjør vár. Men framvegis gera skipini hampiliga góðar túrar.

Fyri nøkrum árum síðan var upsin rættiliga smáur, men nú er fiskurin, sum skipini fáa, væl vaksin aftur.

Hinvegin órógvar tað menn eitt sindur, at rættiliga lítið tykist vera av smáum upsa, eitt nú upsa 5 og 6.

Hvat hetta kemur at merkja fyri veiðina frameftir, er ilt at spáa um í løtuni.



*Fyrr í hesi vikuni vóru eisini aðrar landingar í Sørvági, har eitt nú Vesturvarði og Vesturskin vóru inni*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

### Skip á Sørvági

Í dag landar landingarmiðstøðin í Sørvági trolbátin Skálafoss, sum er heimahoyrandi í Vestmanna. Skálafossur, sum er systirskip til trolbátin Hansu Mariu, ið er heimahoyrandi á Toftum, hevur eini 26.000 pund tilsamans, harav eini 12.000 pund er havtaska, og megin-parturin av restini er upsi.

Sambært heimasíðuni hjá Jóannisi Nielsen landaði Fiskivarði eisini umleið 30.000 í Sørvági miðskeiðis í hesi vikuni.